gult4 cyan4 magenta4 svart4



# Tørvur á heimi fyri deyðsjúk

**- Tað er heilt natúrligt, at eitt vælferðarsamfelag sum Føroyar, bjóðar deyðsjúkum linnandi røkt og umsorgan seinastu tíðina, sigur Jákup N. Olsen, formaður í nevnd, sum kannar tørvin á hospice í Føroyum**

HOSPICE
*Turið Kjølbro*

Um eina góða viku fær landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum handað eitt tilmæli frá eini starvsnevnd, sum hevur kannað tørvin á hospice í Føroyum. Hospice veitir linnandi røkt og umsorgan til fólk, ið liggja fyri deyðanum.

- Uppgávan hjá okkum hevur verið at kanna tørvin á palliativari ella linnandi umsorgan í Føroyum. Vit hava hugt eftir, um tørvurin kann nøktast innan heilsuverkið, samstundis sum vit hava hugt nærri at, um skilabetri er at seta á stovn sjálvstøðugt hospice, heimahospice, eina palliativa eind ella eitt palliativt lið. Vit hava útgreinað fyrimunir og vansar í teimum loysnum vit vísa á, sigur Jákup N. Olsen, formaður í nevndini.

## Greið yvir støðuna

Treytin fyri at taka av tilboði um at koma inn á hospice er, at sjúklingurin er greiður yvir, at eingin lekjandi viðgerð er at fáa.

- Á einum hospice eru góð røkt, umsorgan og eitthvørt pínulinnandi í hásæti soleiðis, at sjúklingurin kann liva virkið tíðina viðkomandi hevur eftir - mótvegis virknari deyðshjálp. Í dag verður hendan røktin partvís veitt á sjúkrahúsunum og heima, men munurin er, at tú sum sjúklingur í Føroyum ikki kanst velja ímillum sjúkrahús ella at verða heima. Skulu vit hava heimahospice má heimarøktin útbyggjast, eitt nú við døgnvakt og hana hava vit ikki sum er.



*- Eg ivist ikki í, at starvsfólk á sjúkrahúsunum gera alt fyri, at tíðin sum eftir er hjá tí ólekjandi sjúka verður so góð sum til ber. Umstøðurnar eru bara ikki nøktandi, sigur Jákup N. Olsen, formaður í nevndini*

- Tað ber eisini til at gera palliativar eindir á øllum sjúkrahúsunum ella eina eind bara á Landssjúkrahúsinum. Palliativar eindir kunnu eisini vera á røktarheimunum, og heimarøktin kann útbyggjast soleiðis at vit fáa heimahospice. Sjálvstøðugt hospice er eisini ein møguleiki, men í tí liggur, at ein bygningur verður bygdur til endamálið. Hinvegin er munurin millum eina palliativa eind og eitt hospice ógvuliga lítil. Mín persónliga meting er, at tað mest realistiska í Føroyum er at seta á stovn eina palliativa eind á Landssjúkrahúsinum. Hinar loysnirnar eru allar dýrari.

Hospice, sum í grundini merkir herberg ella heim fyri deyðsjúk, byrjaði í Onglandi á sinni. Á einum hospice er møguligt hjá sjúklinginum í heimligum umhvørvi at hava síni næstu um seg alt døgnið.

- Eg ivist ikki í, at starvsfólk á sjúkrahúsunum gera alt fyri, at tíðin sum eftir er hjá tí ólekjandi sjúka verður so góð sum til ber. Umstøðurnar eru bara ikki nøktandi fyri at veita viðkomandi tað besta, eitt nú at kunna bjóða teim næstu at vera hjá alla tíðina, sigur Jákup N. Olsen.

## Gongd á

Frá 1. jan. 1996 til 31. des. í 1999, tvs. í fýra ár doyðu 384 føroyingar av krabbameini. Út frá hesum ber til at siga, at tørvur er á einum hospice í Føroyum við 5-6 seingjarplássum.

- Doyggjandi fólk liggja í miðal 20 dagar á sjúkrahúsi í síðstuni.

Í niðurstøðuni í tilmælinum til landsstýrismannin fer arbeiðsbólkurin at skjóta upp, hvussu gongd kann koma á málið.

- Viðvíkjandi tíðarætlan er spurningurin fígging. Eru pengar til staðar, kann farast í gongd beinanvegin.

Tað var eftir áheitan frá sjúkrahúsráðnum, sum er mannað av sjúklingafeløgum, at fyrrverandi landsstýriskvinnan í almanna- og heilsumálum setti eina nevnd at kanna tørvin á hospice í Føroyum. Í nevndini sita umboð fyri sjúkrahúsráðið, sjúkrasystrastjóran, læknafeløg, heimarøktina og Sjúkrasystrafelag Føroya. Nevndin hevur arbeitt síðani seinasta heyst og í næstu viku verður greitt, hvat er komið burturúr.

## TIT SPYRJA VIT SVARA



*Bergur Hanusson, djóralækni* · *Heri Joensen, prestur* · *Heri Kragesteen, sálarfrøðingur* · *Ingi Højgaard, løgfrøðingur* · *Jens Andreassen, lækni* · *Jóhanna á Tjaldrafløtti, føðslu/húsarhaldsfrøðingur* · *Jón Klein Olsen, politistur* · *Jón Kragesteen. Ferðslutrygd* · *Julianna Næs, pedagogur* · *Sjúrður Johannesen, sosialráðgevi* · *Turid Thomsen, lestrarvegleiðari* · *Marius Staksberg, málfrøðingur*

LÆKNIN

### Er slankitablettin vandamikil?

Eri ein ung kvinna, sum vigi nøkur kilo ella rættari fleiri kilo ov nógv. Tí eri eg byrjað at taka slankitablettina "Letigen". Tað sum eg vil spyrja um er: um eg verði við barn meðan eg taki tablettirnar, kanska 1 til 2 um dagin, kann barnið so taka skaða av tablettini? Eg hevði givist so skjótt eg uppdagaði eg var við barn, men tað kunnu jú ganga tvær vikur áðrenn man verður varug við tað.

*Letigen inniheldur coffein og ephedrin. Tað fyrra virkar stimbrandi og mettandi. Tað seinna økir stoffskiftið og harvið feittforbrenningina. Men hesin virknaður er ikki so stórur einsamallur, og tí er Letigen betri, um hann verður brúktur sum stuðlandi heilivágur, har motivatiónin at klænka seg frammanundan er í lagi.*

*Royndargrundarlagið fyri Letigen og líknandi heilivág er ov lítið til at kunna siga nakað um møguliga ávirkan á fostrið - sokallaða teratogena effektin. Men ephedrin virkar á hjartað og æðrar, so pulsur og blóðtrýst økjast. Somuleiðis fær coffein æðrarnar í heilanum at trekkja seg saman. Hesi árinini síggjast meiri og minni eisini í fostrinum. Men um tað er vandamikið, veit mann ikki. Men hví koma barninum í vanda longu frá gitingarstundini? Tí haldi eg, at Letigen er fyri kvinnur, sum gjølla hava tilrættalagt at klænka og í ætlanini hava lagað tað soleiðis, at tær ikki verða við barn, so leingi klænkingin varir.*

LØGREGLAN

### Treytir fyri prutlkoyring

Hvørjar treytir eru fyri at sleppa at koyra á prutli? Kann ein t.d. 16 ára gamal drongur bara sleppa at keypa sær eitt prutl og so koyra avstað, uttan at hava staðið nakra førleikaroynd fyrst. Fyrr var tað soleiðis, at eitt koyrikort til prutl var kravt, men er hetta til longur?

Eisini kundi eg hugsað mær at vita, um tað er í tráð við lógina, at 16 ára gamlir dreingir kunnu keypa prutl/skutarar, sum kunnu koyra 45 km/t. Er markið til tey undir 18 ára aldur ikki 30 km/t?

*Fyri at koyra á prutli, skal ein vera minst 16 ára gamal og hava tikið føraraprógv frá Bileftirlitinum. Eisini fólk, sum eru yvir 18 ára gomul og hava tikið koyrikort, kunnu koyra prutl.*

*Prutl má einans koyra 30 km/t. Spurningurin viðvíkjandi prutl og 45 km/t, er eftir ferðslulógini í Føroyum ein motorsúkkla. Í ES-londunum hava tey nakað sum eitur 45 km/t prutl, men er hetta ikki galdandi í Føroyum. Tað er tó møguleiki at keypa (ES prutl) í Føroyum, sum koyra 45 km/t, men skulu tey tá skrásetast sum motorsúkklur og koma undir somu reglur. Tó eru serligar reglur galdandi fyri hetta slag av motorsúkklum, har ein skal hava koyrikort til antin bil ella motorsúkklu, meðan til vanligar motorsúkklurnar krevst motorsúkklukoyrikort.*

*Vónandi er hetta svarið nóg greitt.*

**Spyrjið serfrøðingarnar**

Hava tit spurningar til serfrøðingarnar, kunnu tit senda teir til:

**Sosialin**
postsmogu 76
110 Tórshavn

ella á fax: 314720
og teldupostadressuna:
spyr@sosialurin.fo

gult5 cyan5 magenta5 svart5



Korini batna:

# Sclerosusjúklingar sleppa aftur til Danmarkar

**Millum 30 og 40 fólk í Føroyum hava ólekiligu sjúkuna sclerosu. Formaðurin í felagnum, Hendrik Jacobsen, metir, at tað týdningarmiklasta hjá sclerosusjúklingum er at hava atgongd til serfrøðing. Henda møguleikan hava sjúklingarnir júst fingið aftur**

SCLEROSA
*Stefan í Skorini*



*Sclerosu sjúklingar gerast ofta rørslutarnaðir, og aðrir missa sjónina. Tað er umráðandi hjá teimum at samskifta hvør við annan*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

Nógv bendir á, at orsøkin til sclerosu er, at nervaskipanin verður álopin av onkrum virusi. Granskarar hava enn ikki funnið ta veruligu orsøkina til sclerosu, men teir nærkast í hvørjum.

Sclerosa rakar oftast ung fólk, sum mugu liva við sjúkuni alt lívið. Støðan hjá einum sclerosu sjúklingi versnar so spakuliga, sum árini ganga, og sjúklingurin missir førleikan. Fleiri gerast rørslutarnað og mugu tí sita í koyristóli, og fleiri missa eisini sjónina.

Tað slepst ikki av við sjúkuna, um tú hevur fingið hana, men jú fyrr sclerosusjúklingurin fer í viðgerð, jú meira verður sjúkan seinkað. Tí ræður um at fáa serkøna hjálp sum skjótast, tá sjúklingurin varnast hana.

Tey norðurlendsku sclerosu feløgini hava júst havt fund í Føroyum, og her verður dentur lagdur á at betra um lívsgóðskuna hjá sjúklingum. Tað er m.a. av alstórum týdningi, at sjúklingarnir fáa sálarsosiala viðgerð. Hetta betrar um lívsgóðskuna, tí sjúklingurin lærir at liva við sclerosu.

Tá sclerosa verður staðfest, er tað umráðandi, at sjúklingurin fær samband við onnur í somu støðu. Mangan heldur sjúklingurin, at hann er einsamallur í hesi støðu, og tí er týdningarmikið fyri lívsgóðskuna at hava samband við aðrar sjúklingar.

Granskarar hava fyri stuttum funnið fram til eitt evni, ið kann tálma sjúkuni, men tó ikki lekja hana. Eingin føroyingur hevði sjúkuna fyri kríggið, men síðan tá hava alt fleiri fingið staðfest sclerosu.

Illgruni er um, at sjúkan stavar frá herpes virusi, sum ávirkar nervaskipanina.

### Munur á Føroyum og grannalondum

Hendrik Jacobsen sigur, at sjúkan sjálvsagt er tann sama her sum aðrastaðni, men umstøðurnar eru ikki eins góðar.

Vit hava ongan serlækna á hesum økinum, og tí skulu sjúklingarnir niður til Danmarkar at fáa viðgerð frá serkønum.

Síðan 1989 hava eingir føroyskir sjúklingar verið niðri á sjúkrahúsum hjá sclerosufelagnum í Danmark, men hesin møguleikin stendur teimum aftur í boði nú. Tveir sjúklingar fara í øllum førum avstað í ár, men fleiri umsóknir eru væntandi.

Vegna avmarkaðar fíggjarligar møguleikar hava føroyskir sjúklingar ikki havt møguleika at leita sær heilsubót í Danmark í fleiri ár. Í føroyska heilsuverkinum hava sclerosurakt ikki eins góðar møguleikar at betra um lívsgóðskuna sum í Danmark, tí hevur tað verið tungt seinastu tíggju árini.

Tá talið av sjúklingum er so lítið í Føroyum, ber ikki til at hava serlæknar og sersjúkrahús. Tí er neyðugt at dúva uppá grannalondini. Tað er av alstórum týdningi, at sjúklingar hava tryggjað sær atgongd til serfrøðing við jøvnum millumbilum.

– Av tí at fleiri sclerosusjúklingar eru rørslutarnaðir, eru vit verri fyri í Føroyum, tí umstøðurnar hjá rørslutarnaðum ikki eru av teimum bestu. Hinvegin eru stórir batar gjørdir á tí økinum, tí fleiri onnur rørslutarnað eru eisini í Føroyum, sigur Hendrik Jacobsen.

Hendrik Jacobsen er formaður í føroyska sclerosufelagnum. Hinir limirnir eru Marianna Simonsen, Jákup Jóhannus Matras, Diana Jacobsen, Mogens Eriksen og Annika Festirstein.

## Innbrot í Skótabúðini ikki Skálabúðini

Í týsdagsblaðnum stóð skrivað, at innbrot hevði verið í Skálabúðini í Havn. Av misgávum er hetta navnið komið skeivt fyri. Tað skuldi vera í Skótabúðini.

Innbrotið var sostatt framt í Skótabúðini á Hoydalsvegi 6 og ikki í Skálabúðini. Tiknar vórðu 5.000 krónur í reiðum peningi og kreditnotur, sum høvdu eitt virði uppá 13.000 krónur.

Vit biðja um umbering fyri mistakið.

# 25 vilja verða fulltrúi

**Ikki færri enn 25 fólk vilja taka tøk í Almanna- og heilsumálastýrinum**

STØRV
*Turið Kjølbro*

Stórt mannfall hevur verið í Almanna- og heilsumálastýrinum í longri tíð. Ikki bert aðalstjórin er farin, men eisini undan og eftir honum heilt fitt av fólki. Grundin til, hví fólk eru rýmd av einum lutfalsliga nýggjum arbeiðsplássi eru ivaleyst nógvar og ymiskar.

- Stór ónøgd við arbeiðsplássið og at stýrið hevur virkað so illa, hevur verið viðvirkandi til, at væl skikkað fólk leita aðra staðni, sigur Sámal Petur í Grund, landsstýrismaður í almanna- og heilsumálum.

Nakað herfyri søkti Almanna- og heilsumálastýrið eftir fulltrúum til ymisk øki. Sóknast verður eftir fólki við akademiskari útbúgving ella líknandi. Høvuðsuppgávan hjá teimum, sum sett verða, verður at ráðgeva deildarstjóra, aðalstjóra og landsstýrismanni, gera og ummæla uppskot til lógir, málsviðgerð og mangt annað. Ikki færri enn 25 umsóknir komu inn. Støða er ikki tikin til, hvussu nógv fólk verða sett ella hvørji verða sett.

- Umsóknirnar eru ikki kannaðar enn, og tí ber ikki til at siga, hvussu nógv fólk verða sett, sigur Sámal Petur í Grund.

Ein innanhýsis bólkur í stýrinum skal kanna tær 25 umsóknirnar. Áðrenn hesin fer til verka, skulu onnur fólk eitt nú løgmaður, landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum, løgmansskrivstovan og onnur taka støðu til, hvør verður næsti aðalstjórin í Almanna- og heilsumálastýrinum. Átta fólk eru um boðið.

# Sinnisbati óbroytt

FELAG
*Turið Kjølbro*

Nevndin í felagnum Sinnisbata er óbroytt aftaná aðalfundin, sum júst hevur verið. Formaður er Svenning av Lofti, Margreta Poulsen er næstformaður, Arnfinn Poulsen er kassameistari, Thomas Thomasen er skrivari og Ásla Svensson er nevndarlimur. Eykalimir eru Maria Andersen, Sólbjørg Petersen og Marjun Holm.

Á aðalfundinum vóru nakrar lógarbroytingar gjørdar, eitt nú varð samtykt, at í framtíðini skulu tríggir eykanevndarlimir vera ístaðin fyri tveir.

Sinnisbati arbeiðir til frama fyri at bøta um korini hjá sinnisbrekaðum, at útvega teimum vardar íbúðir og at finna teimum hóskandi arbeiðir og frítíðarítriv.

**Móttøka**

Í hesum døgum eru 30 ár liðin síðani
Matstovan Muntra
í Fuglafirði læt upp.

Í hesum sambandi verður móttøka
hósdagin 14.06. kl. 14–17.00
á Muntra.

*Øll eru vælkomin!*